## Einki avgjald kortini

Í Grønlandi hevur landsstýrismaðurin í fíggjarmálum, Palle Christiansen, tikið aftur eitt uppskot um at leggja avgjald á fisk, sum ikki verður avreiddur til virking uppi á landi. Eftir uppskotinum skuldi tað almenna hava eina krónu fyri kilo av toski og tvær krónur fyri kilo av svartkalva, og tað skuldi geva landskassanum 22 milliónir krónur næsta ár. Men nú hevur landsstýrismaðurin tikið uppskotið aftur. Við KNR sigur Palle Christiansen, at høvdu avgjøldini komið í gildi, høvdu fleiri reiðarí, sum fiska tosk og svartkalva, farið á heysin. Tí er uppskotið tikið aftur, sigur hann.



## Danir vænta meiri skatt

70 prosent av teimum donsku skattgjaldarunum vænta, at tey sleppa at rinda meiri skatt tey næstu árini fyri at endurrinda tað, sum kreppan kostar. Tað vísir ein kanning, sum stovnurin Copos hevur gjørt, og sum Børsen endurgevur. Síðani tann borgarliga stjórnin kom, hevur skattasteðgur verið í Danmark, og tann politikkurin fer at standa við, so leingi stjórnin hevur valdið, sigur skattapolitiski framsøgumaðurin hjá Vinstra, Torsten Schack Petersen við Børsen. Næsta ár verður hallið í danska ríkiskassanum næstan 100 milliardir krónur.

## Føroyska málnevndin vald av nýggjum

**Landsstýriskvinnan í mentamálum, Helena Dam á Neystabø, hevur tilnevnt limir fyri næsta skeiðið hjá Føroysku málnevndini**

TÍÐINDASKRIV

Skeiðið er frá 1. okt. 2009 - 30. sept. 2013.

Limirnir eru: Jógvan í Lon Jacobsen, dr. philos, lektari – eftir tilmæli frá Føroyamálsdeildini, Erling Isholm, studentaskúlalærari - eftir tilmæli frá Móðurmálsfelagnum, Heðin M. Klein, lærari – eftir tilmæli frá Rithøvundafelagnum, Anna V. Ellingsgaard, blaðkvinna – eftir tilmæli frá Føroyskum Miðlafólkum, Sólvá Jónsdóttir, studentaskúlalærari - eftir tilmæli frá Mentamálaráðnum.

Føroyska málnevndin varð stovnað í 1985 sambært reglugerð fyri Føroysku málnevndina.

Málnevndin er ráðgevandi málrøktar- og málverndarstovnur. Hon gevur einstaklingum og stovnum ráð og upplýsingar um føroyskt mál. Hon hjálpir fólki við at velja og smíða nýggj orð. Hon svarar eisini spurningum um fólkanøvn, staðarnøvn og onnur nøvn. Helena Dam á Neystabø ætlar í næstum at seta eina nevnd at endurskoða grundarlagið undir virkseminum hjá málnevndini og í hesum sambandi at fáa smíðað eina lóg til málnevndina at virka eftir.

# Vakrir seyðir á Borðoynni

**Leygardagin var seyðasýning hildin fyri allar brundseyðir á Borðoynni. Úrslitið gjørdist, at Strandahagi vann bæði fyri vakrasta lambið og vakrasta veðrin umframt at verða besti hagin samanlagt**

SEYÐASÝNING
Leo Poulsen
leo@sosialurin.fo



*Á myndini síggja vit vinnararnar:* ***Standandi frá vinstru:*** *Hemming Syderbø(vakrasta veðrin), Petur Andreasen(ferðasteyp og heiðursbræv) og Heini Ósá (vakrasta lambið)* ***Sitandi frá frá vinstru:*** *Leon Sólheyg(nr 2) og Jákup Skoradal(nr 3). Dreingirnir á myndini eru frá vinstru: Hergeir Dávur Skoradal og Heri Ósá*

Líka síðani 1993 hevur seyðasýning verið annaðhvørt ár á Borðoynni. Fyriskiparar øll árini hava verið Andras Joensen, Krismar Andreasen og Heini Mohr. Seyðasýningin í ár var hildin í seyðahúsinum hjá Strandahaga, og nógvir spentir áskoðarar fylgdu við gjøgnum dagin. Áleið 110 seyðir vóru við á sýningini, so sigast má, at áhugin er stórur á Borðoynni.

Til slíka sýning eru teir flestu brundseyðirnir lomb, men eisini nakrir veðrar verða settir við á hvørjum ári. Hesir verða dømdir hvør sær, soleiðis at steyp verður latið til vakrasta lambið og eisini verður steyp latið til vakrasta veðrin.

Nummar eitt fyri lombini var Strandahagi. Eigari av lambinum var Heini Ósá. Hesin seyður hevði málini 20 cm um mjóðryggin og 85 cm um bringuna. Nummar tvey gjørdist Miðhagin við seyði hjá Jákupi Skoradal. Hesin seyður hevði málini 18,5 cm um mjóðryggin og 84 cm um bringuna. Nummar trý gjørdist Depil fyri norðan. Eigari av tí lambinum var Leon Sólheyg. Hesin seyðurin hevði málini 17,5 cm um mjóðryggin og 81 cm um bringuna.

Vakrasti veðrurin var úr Strandahaga og eigarin av honum var Hemming Syderbø. Veðrurin hevði málini 21,5 cm um mjóðryggin og 101 cm um bringuna.

### Ræst kjøt

Um kvøldið var hugnalig veitsla á skránni og eini 80-100 seyðaáhugað fólk vóru samlað til ræst kjøt.

Á hesi veitslu bleiv eisini eitt ferðasteyp latið til vakrasta seyðin og heiðursbræv latið til vinnandi hagan. Tað var Petur Andreasen, røktingarmaður í Strandahaga, sum tók ímóti steypinum og heiðursbrævinum fyri bæði vinnandi seyðin og vinnandi hagan samanlagt. Hetta er 5. ferð, at Strandahagi vinnur ferðasteypið.

Sýnsmenn vóru Poul Samuelsen úr Vík og Eddie Joensen úr Kollafirði. Eftir ætlan verður seyðasýning aftur um tvey ár fyri brundseyðirnar á Borðoynni.





